# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**

Fyrivarni verður tikið fyri villum



**NISSAN SIRENA 7.PERS DIESEL**
Árg Sept.95, 7. Persónar 2.3 Diesel høgrastýrdur . Kr. 50000.



**FORD ESCORT 1.8 DIESEL HATCHBACK**
Árg Dec-96, Km 105000. Kr. 56000.



**KIA SEPHIA 1.5 GTX**
Árg Mars 97, Km 150000. Kr. 56000.



**FORD ESCORT 1.8 DIESEL STATIONCAR**
Árg Okt.95, Km 105000. Kr. 56000.



**HYUNDAI PONY 1.4**
Árg Juni 92, Km 156000. Kr. 30000.



**FORD ESCORT 1.8 DIESEL SEDAN**
Árg Okt. 95, Kr. 50000.



**SUBARU 1.8 4.WD STATIONCAR**
Árg Maj 87, Km 197000. Kr. 25000.



**MAZDA 626 HATCHBACK**
Árg April 89, Kr. 12000.

P/f. D. B. Bilar
**Jónas Broncksgøta 15**
**Tel. 310600 - Fax 310650**



**TOYOTA COROLLA 1.6**
Km 166000. Er nýsproytaður fyri einum ári síðani, har bæðl skermar, forhurðar og motorur blivu skift. Tosast kann um prísin. Kr. 40000.
**Sera væl hildin og sær sera gott út.**
*Tlf. 372805*



**OPEL VECTRA 1.8**
Árg JAN. 99, Km 30.000.
**TILBOÐ**
**UTTAN BÝTISBIL Kr. 115.000**



**VOLVO 460**
Árg SEPT. 95, Km 92.000. Sýnaður 24.02.03.
**TILBOÐ**
**UTTAN BÝTISBIL 64.000,-**



**FORD ESCORT 1.6**
Árg OKT. 97, Km 57.000. Sýnaður 28.11.01.
**TILBOÐ**
**UTTAN BÝTISBIL 73.000,-**



**OPEL CORSA 1.2**
Árg JAN. 02, Km 23.000.
**TILBOÐ**
**UTTAN BÝTISBIL 85.000,-**



**HONDA ACCORD 1.8I**
Árg APR. 98, Km 85.000. Sýnaður 06.06.02.
**TILBOÐ**
**UTTAN BÝTISBIL 99.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1.3**
Árg JAN. 01, Km 21.000.
**TILBOÐ**
**UTTAN BÝTISBIL 104.000,-**



**MAZDA E**
Árg MEI. 97, VIÐ HØGUM TAKI..
**TILBOÐ**
**UTTAN BÝTISBIL 85.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1.3**
Árg JUN. 97, Km 123.000. Sýnaður 06.03.02.
**TILBOÐ**
**UTTAN BÝTISBIL 69.000,-**



**OPEL ASTRA 2.0 TDI**
Árg FEBR., Km 72.000. Sýnaður 06.06.02.
**TILBOÐ**
**UTTAN BÝTISBIL 99.000,-**



**FORD FIESTA 1.8 D 5 HURÐAR**
Árg APR. 97, Km 110.000.
**TILBOÐ**
**UTTAN BÝTISBIL 55.000,-**

VOLVO RENAULT
VR BILAR
Hoyvíksvegur
tel 322110



**CITROEN SAXO 1.5D 3H**
Árg Jul-98, Km 122.000. Kr. 75000.
**60.000,- Uttan býtisbil**



**CITROEN XANTIA 1.9TD**
Árg Apr. 1998, Km 148.000. Kr. 120000.
**105.000,- Uttan býtisbil**



**PEUGEOT 406 2.2TD STC.**
Árg Juni 1998, Km 100.000. Kr. 135000.



**CITROEN JUMPER 2.5TD LH**
Árg Aug. 1996, Km 120.000. Sýnaður 04/2003. Kr. 120000.
**115.000,- Uttan býtisbil**



**CITROEN ZX 1.9TD 5H**
Árg Mai 1997, Km 160.000. *Prísur fyrr Kr. 120000* – **Nú** Kr. 85000.
**70.000,- Uttan býtisbil**



**MITSUBISHI GALANT 1.8GLS 4H**
Árg Des. 1990, Km 186.000. Nýsýnaður. *Prísur fyrr Kr. 45000* – **Nú** Kr. 30000.
**25.000,- Uttan býtisbil**



**TOYOTA STARLET 1.3 5H**
Árg Aug. 1996, Km 84.000. Kr. 65000.



**PEUGEOT EXPERT 1.9TD**
Árg Feb. 1998, Km 106.000. Kr. 95000.



**CITROEN XSARA 1.6I STC.**
Árg Sept. 2000, Km 32.000. *Prísur fyrr Kr. 128000* – **Nú** Kr. 122000.
**105.000,- Uttan býtisbil**



**FORD ESCORT 1.8D STC**
Árg Nov. 1996, Km 74.000. Kr. 75000.



**SKODA OCTAVIA 1.6I GTX 4H**
Árg Nov. 1999, Km 45.000. Sær sera gott út. Kr. 120000.
**105.000,- Uttan býtisbil**



**CITROEN XSARA 2.0HDI 5H**
Árg Nov. 1999, Km 117.000. Kr. 130000.

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
**Ivan Johansen Bilar**
**Tel 313666 • www.ivan.fo •e-mail: ivan@ivan.fo**


**Sosialurin**
– hevur fingið nýtt telefonnummar

tel 34 18 00
fax 34 18 01

heimasíða: www.sosialurin.fo
teldupostur: post@sosialurin.fo



# Bilar

Nr. 92 • hósdagur • 15. mai 2003 • 77. árg.


# Reyni Service 25 ár í Hoyvík

**8. mai vóru liðin 25 ár síðan Reyni Service flutti úr Rættará og niðan í nýggjan virkisbygning við Vegin Langa í Hoyvík. Tá arbeiddu tilsamans 12 fólk í fyritøkuni. Nú eru tey umleið 50 fólk, sum starvast á teimum ymisku deildunum**




*Nýggi bygningurin hjá Reyni Service við Vegin Langa í Hoyvík í 1978. Tá umboðaði fyritøkan bilar frá British Leyland. Bilmerkini vóru: Morris, Austin, Jaguar og Land Rover*

BILHANDIL
*Magnus Gunnarsson*

Reyni Service er ein gomul fyritøka, ið hevur røtur heilt aftur til 1947, tá Sigird av Reyni (1916-1994) stovnaði fyritøkuna, sum seinni skuldi blíva ein tann stórsta av sínum slagi í landinum.

Sigird av Reyni varð borin í heim 8. september 1916, sonur Jens av Reyni í Havn. Eftir lokna skúlagongd fór hann í elektrikara læru á el-verkstaðnum úti á Rundingi í Havn. Seinni fór hann niður til Danmarkar at útbúgva seg til el-installatør.

Meðan hann var í Danmark brast seinni verðaldarbardagi á, og hann slapp ikki heim aftur, fyrr enn bardagin var av. Hann arbeiddi eina tíð hjá DOMI í Glostrup og áðrenn hann kom aftur til Føroya, hevði hann gjørt avtalu við teir um at umboða Morris bilarnar í Føroyum.

Tá hann kom heimaftur í 1946 yvirtók hann verkstaðin og bygningin hjá pápa sínum niðri í Rættará. Í februar 1947 læt hann upp har við bilverkstaði og el-installatørvirki. Virksemið var stórt á verkstaðnum, og hóast Sigird alla tíðina hevði havt umboðið og søluna av bilunum um hendi, hava aðrir havt verkstaðin undir hond, fyrst Frits Jensen og seinni Sverri Djurhuus.

## Eivind tekur yvir

Í 1969 varð Eivind av Reyni, sonur Sigird, útlærdur sum bilsmiður. Hann hevði staðið í læru hjá Frits Jensen í Gundadali og yvirtók nú verkstaðin. Við tíðini gjørdist ov trongligt í Rættará og sum fráleið varð nærum líka nógv arbeiði gjørt úti á vegnum sum inni á verkstaðnum. Hetta kundi ikki halda á, og ætlanir vóru lagdar um at byggja nýggj hølir til fyritøkuna, sum tá hevði fingið navnið Reyni Service og umboðaði British Leyland bilmerkini, Morris, MG, Rover og Jaguar. Eitt grundøki varð keypt í Hoyvíkshaganum, og í 1978 flutti Reyni Service inn í ein 1300 fermetrar stóran virkisbygning við Vegin Langa. Tá arbeiddu tilsamans 12 fólk í fyritøkuni. Í 1980 fingu teir eisini umboð fyri Toyota bilarnar. Av tí at bilasølan vaks nógv, serliga í 80-unum, varð neyðugt at byggja út vegna plásstrot. Í dag er samlaða gólvvíddin 4000 fermetrar. Umframt Toyota selja teir eisini Iveco vøru- og lastbilar. Fyritøkan er býtt upp í hesar deildirnar, bilasølan, eykalutagoymslan, mekaniski verkstaðurin, plátu- og lakkeringsverkstaðurin og Tidy Car, umframt skrivstovu og fyrisiting og eina deild í Klaksvík. Vit kunnu eisini nevna at fyritøkan er DAF (Dansk Automobilforhandler Foreing) góðkend og nú verður arbeitt við at fáa TSM (Toyota Service Marketing) góðkenning. Umleið 50 fólk starvast hjá Reyni Service, og stjóri er Eivind av Reyni.



*Reyni Service í Rættará. Fleiri nýggir Morris Mini á goymslu. Sigird av Reyni byrjaði í Rættará í 1947*



*Á móttøkuni í 1978, tá Reyni Service læt upp. Eivind av Reyni saman við danska Morris stjóranum Vagn Andersen og konu*



*Í 1978 vóru einans bilar frá British Leyland í framsýningarhølinum hjá Reyni Service. Her er ein Mini Clubman*